# Verkfallið merkist ymiskt

**Tað er ymiskt, sum tað merkist umborð á strandfaraskipunum, at verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum er av. Um Vestmannasund er trýstið ikki øðrvísi enn vant, meðan nógv er at føra við Smyrli**

STRANDFARA-SIGLING
*Edvard Joesen*

Nú verkfallið hjá Skipara- og Navigatørfelagnum er av, er ymiskt, sum tey láta at umborð á strandfaraskipunum, hvussu trýstið á leiðirnar er.

Umborð á Smyrli verður sagt at tað er stórt trýst á dekkinum, nú farið er aftur at sigla. Serliga er tað farmur, sum flytast skal millum Suðuroynna og Havnina, siga tey á Smyrli.

Stórir bilar hava verið nógvir hesar báðar dagarnar, siga tey. Ruskbilarnir hava koyrt dúgliga, eins og tangabilarnir eisini hava havt úr at gera. Tað er dieselolja, sum flutt verður suður, verður sagt.

Eingin goymsla til dieselolju er í Suðuroynni, so bilar, sum koyra við diesel, hava havt tað trupult har suðuri, hesar vikurnar, verkfallið hevur rakt. Hinvegin er bensingoymsla, eins og gassolja altíð er at fáa har suðuri.

Tey vænta eisini umborð á Smyrli, at nakað væl av fólki og persónbilum fara at verða at flyta um Suðuroyarfjørð nú um hvítusunnuna, tí ein stór hvítusunustevna skal verða í Suðuroy.

Hinvegin hevur ikki verið tað stóra av privatbilum at flutt, síðan verkfallið endaði, og tað undrar í grundini eitt lítið sindur, verður sagt av Smyrli. Tað var eingin bíðirøð á Drelnesi, tá farið varð aftur at sigla, og hinvegin hevur heldur ikki vierið nøkur innrás av suðuroyarbilum, sum strandaðir hava verið norðanfjørðs, nú verkfallið hevur verið.

Um Vestmannasund hevur heldur ikki verið nøkur ógvuslig ferðsla, nú Ternan er farin at sigla aftur.

Í grundini minni, enn tey høvdu væntað, siga tey umborð á Ternuni.

Nakað av privatbilum hevur staðið báðumegin. Við ferjuleguna í Vestmanna hava vágabilar staðið, og á Oyrargjøogv hava staðið bilar, sum eitt nú fólk, sum var uttanlands, hevði standandi á flogvøllinum, tá verkfallið byrjaði. Nógvir teirra standa enn, og verða helst fluttir so við og við, tá fólk fær tíð og høvi at koma aftur eftir teimum.

Annars hevur verið dúgliga ferðast við ruskbilum um Vestmannasund, eins og aðrastaðni, nú strandfaraskipini eru farin aftur at sigla.



*Strandfaraskipini sigla nú aftur. Men umborð á Ternuni siga tey, at trýstið hevur í grundini verið minni, enn tey høvdu væntað, nú fleiri bilar hava staðið við ferjulegurnar hesar vikurnar, verkfallið vardi*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Gongur undan hjá IRF



*Full ferð er sett á ruskinsavingina aftur í økjunum hjá IRF, har einki hevur verið tikið, meðan verkfall hevur verið. Á brennistøðini á Hagaleiti vænta tey, at innsavningin er komin í rættlag aftur, tá næsta vika er liðug*

**Tað gongur hampiliga væl at fáa savnað ruskið frá verkfallsraktu økjunum, siga tey á brennistøðini hjá IRF. Í næstu viku vænta tey at vera komin á slætt aftur**

RUSKSAVNING
*Edvard Joensen*

Í Vágum verður í lagi aftur í dag. Í hinum økjunum vænta tey at vera komin í fasta legu aftur í næstu viku, sigur Jógvan Júst Olsen, sum stendur fyri ruskinnsavningini hjá IRF.

Jógvan Júst Olsen sigur, at tað tyngsta at koma ígjøgnum verða Norðoyggjarnar. Har býr nógv fólk, og partar av økinum eru torførir at koma til.

Tað koyra tríggir pressibilar í pendulferð við ruski til brennistøðina á Hagaleiti, sigur hann.

Hann sigur, at ætlanin er at tøma bingjuplássini hesa vikuna. Eisini ætla tey at fáa tikið alt rusk frá handlum og virkjum, soleiðis at farast kann undir at savna inn ruskposarnar frá húsarhaldinum í komandi viku.

Sama framferðarhátt brúka tey eisini aðrastaðni í landinum sigur Jógvan Júst Olsen. Úr Suðuroy komu seks pressibilar norður mikudagin, og tað verður tað sama alla vikuna, væntar hann. Eisini í Suðuroy verður farið eftir bingjuplássum og handils- og vinnuruski fyrst.

Handlarnir hava til dømis nógv papp og pappír, sum verður endurvunnið á Hagaleiti. Tey hava sent eyka bilar til Suðuroyar at heinta hetta ruskið frá vinnuni har suðuri.

Eisini í Suðuroynni vænta tey at klára alt uttan húsarhaldsruskið hesa vikuna. Tað verður so tikið í næstu viku.

Í Sanoynni gongur eit sindur skjótari við húsarhaldaruskinum, sigur Jógvan Júst Olsen, Hann væntar, at tá vikan er av, verða bara nøkur hús á Sandi og í Skopun eftir, har ikki er tómt. Virki og handlar hava tey longu klárað, sigur hann.

Úr Sandoynni hevur tó verið ein lítil tupulleiki at sloppið til við stóru bilunum, tí Teistin tekur bara tríggar slikar stórar bilar í senn, og fleiri eru, sum vilja flytast um Skopunarfjørð, nú verkfallið er av.

Úr Nólsoy heintar IRF rusk við Rituni, sum hevur verið onkran leigutúr har úti eftir ruskinum. Har skuldi eisini farið at verið slætt borð um vikuskfiti, vænta tey.

Frægast stendur til í Vágum, har tað mesta er fingið av oynni, sigur Jógvan Júst Olsen. Bingjuplássini eru tømd, og handlar og virki eru sloppin av við sítt rusk.

Farið er undir at savna húsarhaldaruskið inn, og í Sørvági er liðugt. Væntandi verður liðugt at savna inn í Miðvági og Sandavági í dag.

Tað gongur eisini hampiliga væl at brenna undan á Hagaleiti. Komandi viku verður ikki savnað inn mánadagin, sum er annar hvítusunnudagur, so tá verður eitt heilt samdøgur til at brenna undan, uttan at nýtt kemur inn.

Hóast rúgvurnar, sum nú koma inn í senn, eru rættiliga stórar, er eingin trupulleiki, sum er, at fáa pláss fyri øllum á støðini.

Meðan verkfallið hevur verið, er so mikið minni komið inn, og til hevur tí borið at brent væl undan í køstinum. So nú er rímiliga gott pláss at taka í móti aftur, sigur Jógvan Júst Olsen, innsavningarleiðari hjá IRF á Hagaleiti.



# Er Eysturoyartunnilin ein bølamyrk deyðsfella?

**– Hví er tunnilin vorðin so vátur? Hevur hetta nakað við boringarnar hjá SEV at gera, spyr Jóannes S. Hansen, ið er ein teirra, sum ferðast gjøgnum tunnilin hvønn dag. Dánjal Syderbø, sum starvast hjá Landsverkfrøðinginum, sigur, at orsøkin til nógvu vætuna á breytini er, at pláturnar undan loftinum eru tiknar niður, nú loftið verður reinsað fyri leyst grót.**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*



*– Er Eysturoyartunnilin ein deyðsfella í løtuni, spyrja fólk, sum dagliga ferðast gjøgnum tunnilin.*

Tað er í heilum, at Landsverkfrøðingsstovnurin lýsir við, at Eysturoyartunnilin er stongdur millum kl. 22 á kvøldi og 7 á morgni vegna arbeiði í tunlinum. So seint sum í hesi vikuni hoyrdu vit hesa lýsing í ÚF, og somu lýsing hava vit hoyrt fleiri ferðir seinasta árið fyri ikki at siga seinastu árini.

Stundum hoyrist, at tunnilin verður reinsaður fyri leyst grót undir loftinum, og tað er meira vanligt at síggja hampiligar grótrúgvur liggja skumpaðar saman fram við vegginum í tunlinum.

Hvaðani kemur hetta grótið, er vandi á ferð, og nær verður liðugt at reinsa loftið, spyrja fólk, sum dagliga ferðast gjøgnum tunnilin.

Mong munnu eisini seta sær spurningin, hvussu tunnilin annars er í standi til ta nógvu ferðslu, sum er har dagliga. Og hvør tekur um endan, um ein vanlukka hendir.

### Tunnilin vátur

Jóannes S. Hansen í Saltangará, ið er ein teirra, sum dagliga ferðast til og úr Havn, spyr, hví tunnilin er vorðin so ógvuliga vátur í seinastuni.

– Hevur hetta nakað við boringarnar hjá SEV at gera, sum partvís eru beint omanfyri Eysturoyartunnilin?

Jóannes sigur, at tunnilin hevur ikki verið so vátur áður sum nú.

– Eg vil siga, at tað er serliga galið eystaru megin. Tá ið tú kemur inn í tunnilin, noyðist tú at seta ferðina langt niður, tí annars sært tú einki, tá ið tú kemur inn.

Hann heldur, at tað rættasta hevði verið at sett ferðina niður í 30 km. um tíman við inn-og útkoyringina eystaru megin.

– Í mínum eygum er tunnilin snøgt sagt vorðin vandamikil at koyra ígjøgnum. Vit kunnu hugsa okkum, at ein trailari, sum er á veg út og ein bussur við ferðafólki, sum er á veg inn, møtast við munnan. Tá skal virkuliga ansast væl eftir, soleiðis sum sýnið er við inn-og útkoyringina eystaru megin, sigur Jóannes.

Hann spyr eisini, hvør fer ígongd, um ein vanlukka hendir inni í tunlinum, har eingin telefon hoyrist.

– Er nøkur ætlan tilbúgvin, um tað ringasta hendir? Hvaðani kemur hjálpin? Kemur hon av Streymoynni ella úr Eysturoynni, spyr hann.

Sosialurin koyrdi ein túr ígjøgnum tunnilin hósmorgunin, og rætt er, at koyribreytin er vát so gott sum allan teinin – og sýnið er sera vánaligt.

### Pláturnar burtur

Dánjal Syderbø, sum starvast hjá Landsverkfrøðinginum, vísir avgjørdur aftur, at nógva vætan í tunlinum hevur nakað við boringarnar hjá SEV at gera.

Hann sigur, at orsøkin til vætuna er, at meginparturin av plátunum, sum vanliga eru undir loftinum, eru tiknar undan, nú tunnilin verður reinsaður fyri leyst og ivingarsamt grót.

– Hetta hevur als einki við boringarnar hjá SEV at gera, leggur hann dent á.

Dánjal vísir á, at talan er um pláturnar, ið leiða vatnið, sum kemur undan loftinum, út í vegjagaran, har dren er, sum síðan leiðir vatnið burtur.

– Og tá ið hesar plátur eru burtur, rennur vatnið niður á koyribreytina; tí er tunnilin so vátur í løtuni, sigur hann og leggur aftrat, at nýggjar plátur verða settar uppundir loftið, tá ið reinsingararbeiðið er liðugt.

Spurdur, hvussu gongur við at reinsa loftið, sigur hann, at arbeiðsmenninir nú hava gjøgnumgingið alt loftið, og nú skuldi tunnilin verður so tryggur fyri leyst grót, sum tilber.

– Hetta arbeiði hevur tikið eitt heilt ár. Tá ið tunnilin er opin fyri ferðslu, er strævið at arbeiða í honum. Men um náttina, tá ið hann av og á hevur verið stongdur, er lættari at gera tað, sum gerast skal. Hetta hevur tikið langa tíð, men málið er at gera tunnilin »up to date«, sum hann tekur til.

Dánjal heldur ikki, at Eysturoyartunnilin annars er vátari enn aðrir.

Spurdur, um teir vita, hvussu nógv tons av gróti eru loyst undan loftinum, nú arbeitt hevur verið so leingi í tunlinum, sigur hann, at tað talið hevur hann á skrivstovuni, men ikki við hondina.

– Men tað eru nógv tons tilsamans, sigur Dánjal Syderbø, sum í gjár var í Sandoynni, tá ið Sosialurin tosaði við hann.

# Tveir trolarar landað á Tvøroyri

**Nú verkfallið er av, kann Fiskavirking á Tvøroyri aftur keypa kongafisk, sum verður skorin til flak og fer ísaður av landinum.**
**– Endiliga var hendan marran av, sum verkfallið hevur verið fyri okkum, siga tey á Tvøroyri.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Nú kunnu tey aftur keypa kongafisk á Fiskavirking á Tvøroyri, sum verður skorin til flak og fer ísaður av landinum.*
*Hetta merkir samstundis, at virkið gevur 3-4 krónur meira fyri kilo av kongafiski.*

– Øll gleða seg til várið, men tað hava vit ikki kunnað her suðuri seinastu árini, tí verkføll hava órógað okkum gerandisdagin. Hesi verkføll eru vorðin okkum ein marra á hvørjum vári, siga tey á Tvøroyri.

Fá munnu vera fegnari enn suðuroyingar, nú verkfallið hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag endiliga er av.

Nú kann Fiskavirking á Tvøroyri aftur keypa kongafisk og partvís upsa, sum verður skorin til flak og sendur ísaður av landinum. Hetta merkir eisini, at virkið kann geva trolarunum 3-4 krónur meira fyri eitt nú kongafiskin, tí virkið fær meira fyri sína vøru á útlendska marknaðinum.

Verkfallið hevur ført til, at fleiri djúpvatnstrolarar hava siglt á týska marknaðin við kongafiski, tí teir ikki fingu nøktandi prís í Føroyum, meðan verkfall var. Og tá ið so sølan uttanlands heldur ikki var nakað at reypa av, var eingin nøgdur, heldur ikki limirnir hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag, sum sigla við hesum skipum.

Men verkfallið er av, og nú kann Fiskavirking á Tvøroyri avskipa og keypa fisk á uppboðssølunum sum frammanundan.

### Research og Vesturvarði

Tveir trolarar hava landað á Tvøroyri hesa vikuna.

Vesturvarði hevði 100.000 pund av upsa og kongafiski og Research, sum landaði hósdagin, hevði umleið 70.000-80.000 pund av upsa og øðrum fiskasløgum.

Á Fiskavirking á Tvøroyri hava tey eisini arbeitt nakað av útróðrarfiski.

Tá ið viðrar, eru fleiri bátar á útróðri, bæði við línu og snellu, og sum skilst, hevur fiskiskapurin verið hampiligur – um ikki nakað av reypa av.

– Vit hava havt nóg mikið at gera hesa vikuna, siga tey á Fiskavirking á Tvøroyri, samstundis sum tey fegnast um, at »marran« nú endiliga er av á hesum sinni.